**Magni Laksáfoss**
**løgtingsmaður**
**vegna Sambandsflokkin**

Løgtingið

**Løgtingsmál nr. 91/2017: Uppskot til samtyktar um bygging av kampus og akademiskum vitanardepli**

**Uppskot**

**til**

**samtyktar**

Løgtingið heitir á landsstýrið um at fyrireika og leggja fram neyðug lógaruppskot um at byggja kampusøki til Fróðskaparsetur Føroya, mentanarstovnar og annað vitanarvirksemi.

## Viðmerkingar

Framtíðar samfelagið tykist í alt størri mun at byggja á vitanartungar vinnur, har tað er alt meira umráðandi at fáa hendur á fólki við servitan innan ymisk øki og at hesi samskifta og samstarva á ein smidligan hátt, fyri at skapa loysnir og framburð innan teirra øki og fyri alt samfelagið.

Í hesum sambandi hevur Fróðskaparsetrið ein avgerandi leiklut, bæði sum ein stovnur sum letur útbúgvingartilboð til ungdómin og eisini sum ein týdningarmikil stovnur innan gransking, har nýggjasta vitanin verður savnað og framleidd. Fróðskaparsetrið er sostatt ein natúrligur miðdepil fyri sokallaða akademiska umhvørvið í Føroyum og má tí hava best møguligu umstøður til at virka og mennast undir.

Tað er ein fyritreyt fyri menning av hægri útbúgvingum og gransking, at akademiska vitanin verður savnað á einum kampus-øki við tí endamáli at samansjóða, skapa trivnað og at útnytta synergieffektir, herundir brúka felags høli, útbúnað, lærarar og undirvísing o.a.

Royndirnar úr øðrum londum vísa, at fyri at fáa størst møguligu samansjóðing og synergi-effektir, er umráðandi at skapa eitt umhvørvi, har fólk hittast í tí dagligu gongdini og fáa natúrligt høvi til at práta saman. Tí er umráðandi, at kampusumráðið eggjar til samansjóðan og samstarv millum allar partar.

Ein loysn kundi verið, at eitt kampus við stjørnuskapi verður bygt, har ein felags móttøka, kantina, café og hugnaumhvørvi liggur mitt í umhvørvinum og skapar eitt natúrligt høvi

hjá fólki at hittast. Út frá hugnaliga miðbygninginum kunnu ymisku stovnarnir búleikast í síðubygningum, sum ganga út frá høvuðsbygninginum, við undirvísing, søvnum, gransking og menning.

Í hesum sambandi er tað upplagt, at almennu søvnini, t.d. Fornminnisavnið og Náttúrugripasavnið, verða løgd í sama umhvørvi fyri at gera hesi enn meira áhugaverd og sjónlig, og harvið kunna draga fólk at sær. Samlaði virknaðurin av hesum er, at skapt verður eitt spennandi og gevandi umhvørvi til gagns fyri bæði útbúgving og mentan.

Samstundis er upplagt, at vitanartungar vinnur og vitanartungt virksemi fáa rúmd og umstøður í sama umhvørvi, sum útbúgvingin og granskingin gongur fyri seg, fyri harvið at fáa léttari atgongd til nýggjastu og bestu vitanina á økinum og harvið fáa størst møguligar synergieffektir.

Endamálið við at savna hesi virksemini - útbúgving, almenn søvn og vitanartungar vinnur og virksemi - í eitt og sama umhvørvi er sostatt at skapa eitt dynamiskt og spennandi umhvørvi, ið kann samansjóða akademisku vitanina í samfelagnum og sum kann vera við til at skapa synergieffektir.

At skipa hægri útbúgvingar og samansjóða akademiska virksemið í landinum í eina stóra eind og harvið tryggja góðar fysiskar karmar, fer uttan iva at fáa næmingar og granskarar úr øðrum londum at koma til Føroyar.

Uppskotið til samtyktar leggur sostatt upp til at farið verður undir at byggja neyðugu karmarnar til tað virksemið, ið nevnt er omanfyri. Í stóran mun er talan um virksemi, ið longu er í gongd í samfelagnum og tí vil uppskotið ikki føra størri rakstur við sær, í og við at raksturin longu er á fíggjarlógini. Talan er harafturímóti um at savna verandi virksemi saman í størri og meira hóskiliga eind, enn tað sum støðan er í dag.

**Á Løgtingi tann 27. februar 2018**

Magni Laksáfoss